# Tvey brúdleyp – tveir siðir



TÁ NIELS OG SALLYVER GIFTUST VAR TAÐ IKKI EIN HENDING, SUM FÓR STILLISLIGA AFTUR VIÐ BORÐINUM. FYRST VAR BRÚDLEYP Í MIÐVÁGI, OG SÍÐANI Í PUERTO PRINCESA.

**Føroyar**: Til den lyse morgen

Mai mánaður er besti mánaður til veður. Og hesin leygardagurin 16. mai 2009 var einki undantak í so máta.

Veðrið var av tí allarbesta. Ikki eitt skýggj sást á luftini, so longu frá morgunstundini var lagt upp til, at hetta varð ein dagur sum skuldi spyrjast.

Vígslan skuldi verða í Miðvág kirkju og festin aftaná á Hotel Vágum. Allar brúðarvígslur eru serstakar, og tað var henda eisini, í fyrsta lagi tí at alt gekk fyri seg á enskum.

Brúðarparið hevur stóran áhuga fyri tónleiki, og tí var nógvur sálmasangur og aðrar tónlistarligar framførslur í kirkjuni. Og sum tað triðja vóru eisini faddrar við til vígsluna, sum Bergur Debes Joensen, prestur stóð fyri.

Hetta við faddrum er siður, sum filipinar hava tikið upp frá amerikumonnum. Og henda dagin í Miðvági var einki undantak gjørt í so máta. Aftaná varð so ein føroysk brúðarveitsla á hotellinum, við øllum tí sum hertil hoyrir.

Her var skipað so fyri, at eitt headset varð fingið til vega til Sallyver og móður hennara. Tær fingu so alt týtt til enskt.

- Hetta var eitt fantastiskt brúdleyp. Tað vardi til den lyse morgen, siga tey bæði við einum brosi.

## Filipsoyggjar: Alt í orange

Hóast Niels og Sallyver vóru formliga gift í føroysku kirkjuni, so ynsktu tey at lokaka kirkjan eisini skuldi geva sítt vælsignilsi til brúðarparið. Samstundis fekk familjuni hjá henni møguleikan at halda brúdleypsveitslu fyri teimum nýgiftu.

Avgerð varð tikin um at hetta skuldi vera millum jól og nýggjár í fjør. Fyri at Niels ikki skuldi vera heilt einsamallur til hátíðarhaldið í kirkjuni hjá Sallyver, fór ein góður partur av familjuni hjá honum ta longu leið til Filipsoyggjarnar. Har vóru bæði foreldur, systkin, makar og børn teirra við. Í fylginum vóru 12 føroyingar.

Fjarstøðan millum okkara oyggjar og Filipsoyggjar er stór, og tað er mátin at halda brúdleyp eisini. Vit skulu nerta við nakað av tí:

Í fyrsta lagi fara fólkini í stásklæðini beinanvegin. Tað vil siga, at í Føroyum fer ein í kirkjuna í vanligum klæðum og fer síðani í stásklæðini til veitsluna.

- Ja, mamma mín skilti ikki rættiliga, hví fólk í Føroyum ikki fara í teirra bestu klæðir beinanvegin, sigur Sallyver við einum brosi.

Júst hetta við klæðunum verður gingið sera høgt uppí, tí her skulu allir menninir hava einslitta hvíta skjúrtu, og allar kvinnurnar einslittar kjólar. Tað vil siga, at brúðurin avgerð, hvør høvuðsliturin skal vera hjá kvinnunum, og so mugu tær bara finna sær hóskandi klæði.

Eisini í hesum føri kunnu onnur veita fólki tænastur, og tí ber nevniliga til at leiga klæðini frá einum handli í býnum. Øll máttu fyrst hagar at taka mál, og fingu síðani klæðini útflýggjað undan veitsluni.

Ein partur av veitsluni er siðbundni brúðardansurin ella "pengadansurin".

Her knýtir brúðarfólkið pengaseðlar upp á brúðarparið, soleiðis at tey kunnu fáa eina góða fíggjarliga byrjan uppá hjúnarlagið.

Tann stóra brúðarkøkan hoyrir sjálvandi við til eitt filipinskt brúdleyp. Henda var sjálvandi orange-litað, og sum siður er, skuldu tey bæði, Niels og Sallyver skera fyrsta stykkið av hesi køkuni.

